TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

**Løgtingið**
**mentanarnevndin og fíggjarnevndin**

**Att.: Hanna Jensen, forkvinna,**
**Att.: Rutt Vang, forkvinna**

6. november 2018

**Viðv. stuðli sbrt. lógini um bygdarsøvn**
Í sambandi viðgerðina av fíggjarlóg fyri 2019 í løgtinginum, vil Tórshavnar kommuna vísa á viðurskifti, ið ikki eru nøktandi viðv. stuðli til góðkend bygdasøvn.

Í hjálagda skjali sæst skriv til Mentamálaráðið um viðurskiftini við atliti til stuðul sbrt. § 4, stk. 1 í Ll. nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarsøguligum virksemi, við seinni broyting. Nettojáttanin hjá kommununi til Tórshavnar býarsavn er 800 tkr. og skuldi tað givið 1.200 tkr. í stuðli frá landinum, men fekk játtað 214 tkr. fyri 2018.

Í viðmerkingunum til uppskot til játtan 2019 fyri konto 7.24.3.06 Søvn landsins (stuðulsjáttan) 01. Bygdasøvn, stendur m.a. at "Landið letur góðkendum bygdasøvnum stuðul, ið er 60% av góðkendum rakstrarútreiðslum." Hetta er ikki í tráð við ásetingina í lógini § 4, stk. 1., ið ásetur at landið letur góðkendum bygdasavni í studningi 60% av rakstrarútreiðslunum.". Orsøkin tykist vera at stuðulsjáttanin er ov tepur í mun til virksemið innan virksøkið og vil kommunan tí heita á løgtingið um at fáa bøtt um støðuna.

Vinarliga

Annika Olsen
borgarstjóri

/Bjørgfríð Ludvig
kommunustjóri

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

**Mentamálaráðið,**

9. mai 2018

**Mótmæli viðvíkjandi tillutaða stuðlinum til Tórshavnar býarsavn fyri 2018**

5. mars 2018 fekk kommunan hjálagda svar frá Tjóðsavninum viðv. stuðli sbrt. bygdasavnslógini fyri 2018.

Stuðulsjáttanin frá Tjóðsavninum er uml. 18% av tí, sum lógir ásetur. Í skrivinum brúkar Tjóðsavnið hugtak nevnt 'Góðkend fíggjarætlan' uttan nærri at útgreina, hvørjar útreiðslur, sum kommunan hevur sett í fíggjarætlanina, ikki kunnu góðkennast.

Hetta er als ikki nøktandi støða og er at halda bygda- og býarsavnsøkinum fyri gjøldur.

Tórshavnar býráð hevur á fundi 24. apríl 2018 samtykt at mótmæla, at Tórshavnar býarsavn fær tillutað eina játtan, ið bert er ein brotpartur av tí, sum lógin ásetur.

Vit frætta fegin um, hvussu henda støðan kann fáast í rættlag.

Vegna Tórshavnar kommunu

Annika Olsen
borgarstjóri

/ Bjørgfríð Ludvig
kommunustjóri

Móttikið
2 0 MRS. 2018
Journal

TJÓÐSAVNIÐ

Hoyvík 5. mars 2018

Tórshavnar Býarsavn
Tórshavnar kommuna,
Mentamáladeildin,
Postboks 32
110 Tórshavn

**Tórshavnar Býarsavn, góðkend fíggjarætlan 2018**

Vísandi til § 3, 2. stk. í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi og væntaða fíggjarkarmin til bygdasøvn í 2019 sambært løgtingsfíggjarlógini 2018 verður sagt frá, at góðkendur fíggjarkarmur í 2018 er sum í talvuni niðanfyri:

| | |
|---|---|
| **Góðkendar rakstrarútreiðslur (íroknað avskriving av bygningum og serlig tiltøk)** | **356.667** |
| **Góðkendar útreiðslur til íløgur (umvæling, bygging, keyp)** | |
| **Góðkendar útreiðslur tilsamans** | **356.667** |
| **Stuðul til rakstrarútreiðslur (60%)** | **214.000** |
| **Stuðul til íløgur (umvæling, bygging, keyp) (50%)** | |
| **Stuðul tilsamans** | **214.000** |

Stuðulsupphæddin til rakstrarútreiðslur er sambært bygdasavnslógini 60% av rakstrarútreiðslunum. Upp í hesar verður roknað: Samsýning til starvsfólk, keyp av gripum, røkt av fornminnum, hiti, ljós, reingerð, innbúgv, leiga av hølí o.t. ella renta og avskriving av bygningum, savnið hevur.

Harumframt kann Landið sambært bygdasavnslógini lata 50% í studningi til keyp ella bygging av savnshúsum og til keyp av jarðføstum fornminnum og bygningum, ið kunnu góðtakast sum fornminni. Játtan um tílíkan stuðul verður veitt við støði í fakligum tilmæli frá antikvarisku umsiting landsins og teimum fíggjarligu fyritreytunum, sum savnsmyndugleikin hevur at veita játtan til endamálið.

Góðkend bygdasøvn hava sambært bygdasavnslógini rætt til 60% í studningi til avskrivingar fyri keyp av fornminnum og bygningum, sum eru góðkend. Avskrivingin er ásett at vera 4% um árið av restvirðinum, tá ið landskassastudningur og kommunustudningur í sambandi við íløguna er frádrigin. Avskrivað verður í 10 ár frá útveganarárinum at rokna.

Blíðar heilsanir

Herleif Hammer